# Flaggdagskoyring við ellisakførum

ELLISAKFØR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Undir flaggdagskoyringini hjá Føroya Ellisakførum í Havn vóru fleiri »nýggj« ellisakfør at síggja.

Flaggdagskoyringin hjá Føroya Ellisakførum hevur verið eitt afturvendandi tiltak, síðan felagið varð stovnað í 1992. Hesaferð vóru nógv akfør við í tiltakinum, bæði motorsúkklur og bilar. Eisini vóru nøkur nýggj ellisakfør, sum ikki áður hava verið við í flaggdagskoyringini.

Ellisakførini koyrdu frá felagshølunum hjá Føroya Ellisakførum yviri við Strond í raðkoyring gjøgnum býin og oman á Kongabrúnna, har tey vóru sýnd fram, meðan flaggdagshaldið var á Vaglinum.

Tá flaggdagshaldið var liðugt, bleiv aftur koyrt yvir í felagshølini yviri við Strond. Eftir ein steðg upp á umleið ein tíma koyrdu ellisakførini í raðkoyring niðan á Oyggjarvegin til eina filmsupptøku, sum skal nýtast til ein film, ið skal lýsa Føroyar sum ferðamannaland.

Samrøða er við Charlis Johansen og Sigmund Hansen, sum eru eigarar av "nýggjum" ellisakførum í Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.05.




*Eitt av nýggju ellisakførunum, ein Buick Wildcat hjá Charlis Johansen í Runavík*

*Mynd: Birgir Waag Høgnesen*






*Bedford lastbilurin frá 1951 hjá Sigmundi Hansen í Kollafirði*



*Bæði nýggjar og gamlar motorsúkklur koyrdu í býnum flaggdagin*



*Motorsúklur og bilar yviri við Strond. Fremst er ein Ford A frá 1930 hjá Eiriki Lindenskov*




*Tveir lastbilar úr Kollafirði. Rasmus Rasmussen frá I.R. Lastvognum við einum Scania frá 1995 og Sigmund Hansen við sínum Bedford frá 1951*